# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tað er einki stuttligt at fylla 70, men tað er hóast alt frægari enn alternativið*

*(Haraldur kongur)*

# Skjótt siglandi um Norðpólin




*Reiðaríini kunnu spara eina mió. krónur hvønn túr, um skip kunnu fara ígjøgnum Pólhavið heldur enn Suezveitina ella Panamaveitina*

**Ísurin kring Norðpólin minkar í hvørjum, og tey stóru reiðaríini ætla sær at brúka farleiðina tann vegin, tí har er nógv at vinna**

Farmaskip, sum sigla upp á amerikonsku vesturstrondina ella havnir í Norðurasia, fara at spara umleið 40 prosent í siglitíð, um tey kunnu sigla ígjøgnum Pólhavið heldur enn at noyðast ígjøgnum Suezveitina ella Panamaveitina sum nú. Tað fer at gera, at reiðaríini kunnu spara umleið eina millión krónur fyri hvørt skip hvønn túr.

Kanadiskir granskarar halda, at tað verður siglandi ígjøgnum Pólhavið longu innan 2030, og í norska reiðarafelagnum eru menn longu farnir at fyrireika seg til tær broyttu umstøðurnar.

Lars Almklov, sum er stjóri á uttanríkisdeildini hjá norska reiðarafelagnum, sigur við Aftenposten, at Norðurnoreg kann fáa stóran týdning, tá altjóða skipaferðslan verður umskipað. Eitt nú er tað væl hugsandi, at vanlig farmaskip fara at leggja at í Norðurnoregi at umskipa farm umborð á skip, sum eru bygd til sigling á leiðum, har ísurin kann vera. Harafturat skulu hesi skipini hava olju, proviant og annað, og tí kann Norðurnoreg fáa nógv burtur úr broyttu farleiðini, sigur Lars Almklov. Hann mælir norskum politikarum at fara undir fyrireikingarnar longu nú.

–Vitskulu hugsa stórt, sigur stjórin á uttanríkisdeildini hjá reiðarafelagnum og vísir á, at øll tey stóru reiðaríini fyrireika seg til broyttu umstøðurnar.

# Vorðið sum høgguslokkur

**Nýsælendskir fiskimenn hava fingið in høgguslokk, sum hevði eygu sum bildekk**

Teir nýsælendsku fiskimenninir fingu tann ovurstóra høgguslokkin á línu nærhendis Antarktis. Tað vísti seg, at hann vigaði 450 kilo og sostatt 150 kilo meiri enn tann størsti, sum menn vistu um frammanundan.

Steve O'Shea, høgguslokkaserfrøðingur á lærda háskúlanum í Auckland, sigur við AP, at vísindin hevur sera stóran áhuga fyri tí ovurstóra høgguslokkinum. Fyribils hevur hann fingið latínska navnið Mesonychoteuthis, sum merkir „risahøgguslokkur", og alt bendir á, at hetta er tann størsti høgguslokkurin, sum



*Eyguni á tí ovurstóra høgguslokkinum vóru sum bildekk*

nakrantíð er veiddur, sigur John O'Shea.

Tann størsti, sum menn vistu um frammanundan, vigaði 300 kilo og varð fingin í Rosshavinum við Antarktis fyri trimum árum síðani.

STUTT SAGT

## Prodi misti tolið

Italski forsætisráðharrin, Romano Prodi, bað í gjárkvøldið um at verða loystur úr starvinum sum forsætisaráðharri, eftir at stjórn hansara hevði tapt eina atkvøðugreiðslu í tjóðartinginum um uttanríkispolitikkin hjá stjórnini. Í fyrstani ljóðaði, at Giorgio Napolitano, forseti, hevði tikið uppsøgnina til eftirtektar, men seinni frættist, at hann hevði biðið Pordi halda fram og kannað møguleikarnar fyri at skipa nýggja stjórn. Politiskir eygleiðarar í Rom søgdu í gjárkvøldið, at tað er neyvan nakar ivi um, at Prodi verður sitandi sum forsætisráðharri, men at hann fer at umskipa stjórnina. Sambært eygleiðarunum er snøgt sagt eingin annar politiskur møguleiki.

Samgongan aftan fyri stjórnina hjá Prodi er sett saman av fleiri flokkum, sum í fleiri viðurskiftum hava sera ymisk sjónarmið. Eygleiðarar í Rom siga, at flokkarnir kortini fara at finna eina semju um at halda fram, tí eingin teirra hevur áhuga í, at høgraflokkarnir við Silvio Berlusconi á odda skulu fáa valdið aftur.

## Blair kroystur

Tað vóru neyvan hernaðarlig viðurskifti, sum fingu Tony Blair at gera av at taka nakrar av teimum bretsku hermonnunum úr Irak. Politiskir eygleiðarar í London siga, at forsætisráðharrin er so illa kroystur, at hann noyddist at taka okkurt munagott stig fyri at bøta um umdømið hjá sær og flokkinum.

Ein nýggj meiningakanning í gjár vísti, at var parlamentsval nú, hevði stjórnarflokkurin Labour fingið 31 prosent av atkvøðunum,. meðan tann konservativi andstøðuflokkurin hevði fingið 42 prosent. So stóra leiðslu hava tey konservativu ikki havt síðani í juli í 1992.

Tony Blair leggur ætlandi frá sær í summar, og tá tekur Gordon Brown, fíggjarmálaráðharri, við. Eygleiðarar í London vilja vera við, at tað var Brown, sum bað Blair taka nakrar av hermonnunum heim úr Irak.